## DAGSINS MEINING

# 17. maðurin

Líkt er til, at rumbulspolitikarin úr Eysturoynni um stutta tíð ikki fer at skapa samgonguni og serstakliga løgmanni ella fyri tað sínum egna flokki eins stórar trupulleikar og higartil. Eftir miklu orrustuna, sum íkom eftir grein í bløðunum, tykist nú friðsælan aftur at valda í samgongunui. Men soleingi Torbjørn Jacobsen framvegis er 17. maður, er einki vist. Tó so – formaður hansara hevur í seinastuni givið nøkur signal um, at ein einsamallur tingmaður skal ikki sleppa at seta alla samgonguna og harvið maktstøðuna hjá Tjóðveldisflokkinum uppá spæl. Nú fáa vit so at síggja. Fíggjarlógin stendur í durunum, og hon kann geva miklan gang.

Men leikluturin hjá glyvramanninum sum 17. maður í samgonguni kann skjótt gerast søga. Í hvussu er fyri eina tíð. Danska fólkatingið, ið hann er ein partur av, fer skjótt aftur til arbeiðis. Tá er ikki óvanligt, at næstvaldu koma á ting fyri fólkatingsumboð. Í samrøðu við blaðið ger fólkatingsmaðurin og tingmaðurin Torbjørn Jacobsen greitt, at alt eftir hvussu stór arbeiðsbyrðan verður, fer hann at gera av, um og nær hann skal lata partafelaga sín úr Fuglafirði koma á ting.

Tað er eingin ivi um, at henda støðan er kærkomin ikki bert fyri løgmann men ikki minst fyri Tjóðveldisflokkin, tí hóast tingfólkini har uttan iva fegnast um at hava ein millum tey, sum kann gera tað »neyðuga« skitna arbeiðið fyri at markera flokkin, so hugsa tey sum politikarar flest um at verða sitandi við valdinum so leingi tilber. Tað var um reppið, at Torbjørn Jacobsen forkom teimum hetta sama vald. Og tað skal ikki henda aftur. Tí kemur tað væl við, at hann í næstum setir beina kós móti Christiansborg og helst verður verandi har fyri eina tíð.

Tað er tí líkt til, at samgongan hevur megnað at sigla millum fyrstu skerini. Áhugavert verður tó at síggja, hvussu leingi aftrat løgmaður fer at finna seg út framhaldandi at verða fyri lemjandi atfinningum frá tjóðveldismonnum. Ella fjalir her seg ein gummimaður , sum teknarin á baksíðuni á sinni gjørdi vart við! Hann hevur neyvan gloymt herferðina hjá Hesuferð og niðurgerðingina av sær á Vaglinum á sinni. Spurningurinm er tí eisini, hvussu tað fer at eydnast formanni Tjóðveldisfloksins at temja sínar egnu í eini tíð, har flest øll vita, at løgmaður og hansara ikki fara at halda seg aftur at leggja fótonglar fyri sínar samgongufelagar, ið hava ilt við at gloyma, at løgmaður steðgaði teirra fullveldisdreymum.

Tjóðveldisflokkurin skal skjótt upp til roynd. Man tað eydnast løgmanni at fáa Tjóðveldisflokkin til at venda gomlu løgtingssamtyktunum um, at Føroyar skulu vera uttanfyri herðnaðarligar samgongur, bakið! Og hvussu við fíggjarlógini, nú flokkarnir hava skarvað 360 mill. av blokkinum við einum høggi, um somu tíð, sum teirra fólk vilja játta pengar til síni øki!

Andstøðan hevur sum heild verið alt ov spøk eftir valið. Demokratiið krevur av henni, at hon kennir sína vitjunartíð. Uppgáva hennara er at geva landsstýrinum eitt mótspæl t.v.s. bæði sjálv at koma við ítøkiligum uppskotum og at krittiskt at viðgera tað landsstýrið leggur fram.

**Sosialurin**

# Góður árgangur á Viðareiði

**Árið 1995 var fruktagott á Viðareiði, tí mánadagin byrjaðu 11 næmingar í 1. flokki. Seinnu árini hevur bara ein annar árgangur verið so stórur; tað eru tey, sum nú ganga í 7. flokki**

SKÚLI
*Rúna Sivertsen*



*Í skúlanum við Løkjuna á Viðareiði byrjaðu 11 næmingar í 1. flokki mánamorgunin. Hetta er ein rættiligur dreingjaflokkur, 8 dreingir og bert 3 gentur.*
***Aftara rað frá vinstru:** Kári, Absalon, Sørin, Eivindur, Ólavur, Olivur, Høgni.*
***Fremra rað frá vinstru:** Jóanes, Rakul, Óluvá, Malan og flokslærarin, Jensebeth Absalonsen.*
*Mynd Gudny Benjaminsdóttir*

Mánamorgunin kl. 10.30 møtti 1. flokkur í skúlanum við Løkjuna á Viðareiði. Í ár eru tey heili 11 í tali, og tað er nógv í einum so lítlum skúla.

Týsdagin byrjaði so rættiliga skúlagongdin aftur hjá teimum 56 næmingunum, sum í ár skulu ganga í skúla á Viðareiði.

Seinasta skúlaár gingu 54 næmingar í skúlanum við Løkjuna; 9 teirra fóru í framhaldsdeild í Klaksvík, har tey ganga í 8. flokki á Ziskatrøð.

Skúlin á Viðareiði gjørdist sum so mangir aðrir skúlar ov lítil, tá nýggja fólkaskúlalógin, við øðrvísi krøvum til undirvísing, varð sett í verk.

– Vit eru noydd at nýta bókasavnið til undirvísing, og teldurnar hava vit í standandi í ganginum, sigur Anita Køtlum Petersen, 1. lærari á Viðareiði.

– Vit hava heldur onga stovu til serundirvísing, so tað mugu vit nýta lærarastovuna til, sigur hon.

Anita sigur, at tey eisini royna at loysa plásstrotið við forskotnari skúlatíð, t.d. hava vit flutt tónleikaundirvísingina til eftir skúlatíð.

Sosialurin hevur fingið hendur á einari mynd av teimum 11 næmingunum í 1. flokki á Viðareiði. Fleiri teirra eru í nýggjum heimabundnum troyggjum. Í mynstrið í troyggjuni hjá Høgna er bundið: Høgni fer í skúla, – júst sum í lesibókini, tey nú fara at terpa seg ígjøgnum.

# Hugnaligur leygardagur í bátahýri

**Leygardagin verður skipað fyri útitiltøkum í bátahylinum á Glyvrum í sambandið við, at atløgubryggjan alment verður tikin í nýtslu**

ÚTITILTAK
*Tíðindaskriv*

Leygardagin 24. august verður atløgubryggjan í bátahylinum á Bakka á Glyvrum alment tikin í nýtslu. Í hesum sambandi skipar Bátafelagið fyri ymiskum tiltøkum.

Byrjað verður kl. 15 við, at havnarnevndin í Runavíkar Kommunu kemur rógvandi inn í bátahylin og leggur at bryggju. Kári P. Højgaard, formaður í havnarnevndini, heldur røðu.

Seinni verður m. a. barnasangur við Duritu og fleiri, hestaríðing og rógving. Harumframt verður høvi at keypa grillaðar pilsur og sodavatn. Kaffi og okkurt gott afturvið verður eisini til keyps.

Peningurin, ið inn kemur, fer til felagshús. Bátafelagið bjóðar øllum til ein hugnaligan dag í bátahýri.

## Lunnadansur á Glyvrum

DANSUR
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið komandi verður Lunnadansur (Túnadansur) við Kappróðrarneystið á Bakka á Glyvrum.

Nógvur góður tónleikur verður at hoyra hetta kvøldið. Til dansin spæla Kim Hansen, James Olsen, Jens Marni Hansen og Pauli Magnussen.

Harumframt verður harmonikutónleikur við lokalum tónleikarum.

Undir dansinum verður eisini høvi at keypa sær ein tallerk við fiskasúpan. Dansurin byrjar kl. 23 og viðrar ikki, verður dansurin inni í Kappróðrarneystinum.

Kappróðrarfelagið NSÍ bjóðar øllum vælkomnum til eitt stuttligt dansikvøld við Kappróðrarneystið á Bakka á Glyvrum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.





